Runt um Suðuroynna við føroyskum bátum

Ætlanin var, at einir 30 skotar skuldu verða við. Men tað bleiv enn eitt dømi um mentantaligt samstarv ímillum okkum og næstu grannar okkara, sum datt niðurfyri, tá Smyril helt uppat at sigla til Aberdeen



Vágbingar hava gjørt eitt stórt, slóðbrótandi arbeiðið at varðveita gamla, føroyska bátin. Í summar skipa teir fyri kappsigling við árum og seglum runt um Suðuroynna. M.a. verða grindabátarnir. Men ætlanin at geva skotum kans at hevna óstigurin frá kappsiglingini runt um Isle of Skye verður av ongum

ÁKI BERTHOLDSEN

Í summar er ætlanin at skipa fyri kappsigling runt um suðuroynna við gomlum, føroyskum bátum og nýggjum bátum, bygt í gomlum sniði.

Hugskotið til hetta fingu vágbingar, tá ið teir fyri trimum árum síðani vóru við í eini kappsigling við Svaninum runt Isle of Skye vestan fyri Skotland.

Ta ferðina vunnu vágbingar.

Men sum góðir ítróttarmenn, vildu vágbingar geva skotunum ein kans at hevna ósigurin.

Ætlanin var tí at fáa tríggjar bátar haðani at verða við í eini kappsigling við árum og seglum runt um allar Føroyar í summar.

Áhugin var stórur fyri at koma.

Men so gavst Smyril at sigla til Aberdeen og so datt henda ætlanin niðurfyri.

– Tað verður alt ov dýrt at flyta einar 30 mans higar, nú Smyril er givin at sigla, sigur Árni Brattaberg, sum vágbingar hava valt at skipa fyri tilkarnum.

Hetta, at varðveita teir gomlu bátarnar, er ikki bara komið upp í Føroyum seinastu árini

Tað hava bygdarløg í Skotlandi og í oyggjunum har um vegir, eisini fingið áhuga fyri.

Men hetta er so enn eitt dømi um mentanarligt samstarv ímillum okkum, og næsta granna okkara, sum mátti luta, tá ið strandferðslan misti skotlandsrutuna.

Runt Suðuroynna

Men Árni Brattaberg sigur, at tey hava ikki heilt slept tiltakinum kortini.

Ístaðin fyri eina kapping ímillum skotskar og føroyskar bátar, runt um Føroyar, er ætlanin at skipað fyri kappsigling runt um alla Suðuroynna fyri føroyskum bátum við árum og seglum.

M.a. væntar hann ,at grindabátarnir fara at verða við. Somuleiðis vónar hann, at tað fer at liggja fyri hjá Tróndi Patursson og teimum at koma við sínum seksæringi og ein seksæringur verður bygdur á Tvøroyri og møguliga verður talan um aðrar bátar við.

Ætlanin er, at gera hesa kappsiglingina til eitt afturvendandi tiltak í Vági annaðhvørt ár, tað árið Jóansøkan er á Tvøroyri.

Í summar er ætlanin at hava hana vikuskiftið 5.-6. juli, tá ið tað liggur væl fyri til streym.

Nógv fyrireiking

Árni Brattaberg roknar við, at tað fer at taka einar tveir dagar at sigla runt um Suðuroynna.

Hann sigur, at nógvar fyrireikingar skulu til, áðrenn tað ber til at loysa frá landi og seta segl.

M.a. skal avtala fáast við Vaktar og Bjargingartænastuna um, hvussu bnátarnir skulu verða útgjørdir, tí tað er jú opið hav, teir skulu sigla á fyri ein stóran part.

Skipast skal eisini fyri at hava fylgisskip.

Fyribils er ætlanin, at fáa Johonnu at fylgja við bátunum, men enn er óvist, um hon er tøk tá.

Spurningurin er eisini, hvussu nógv fylgisskp skulu verða.

– Á Isle og Skye var bara eitt fylgisskip, men vit hildu, at tað hevði einki gjørt við einum afturat.

– Tað eina strekkið sigldu vit 70 fjórðingar og tá vóru vit heilar 18 tímar í Svaninum í einum

– Veðrið var rættiliga ringt eitt skiftið og tað vóru fleiri tímar ímillum bátarnar, sum sigldu kapp.

– So vit vóru ikki heilt álvuligir tá ið vit hugsaðu um, at tað var bara hetta eina fylgisskipi, sigur Árni Brattaberg.

Ætlanin er, at so nógv feløg í Vági sum møguligt, skulu vera saman um tiltakið, m.a. grindabátarnir, Johanna, VB, jómsvíkingar o.s.fr.

– Men enn er óvist, hvørji verða við, tá ið avtornar, sigur Árni Brattaberg.

tíðindablaðið
SOSIALURIN
BOX 76 · 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið

64



Ja!

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum – og fái blaðið ***5 ferðir um vikuna.***

- ☐ Haldarar í Føroyum: 235,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Danmark: 425,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Danmark: (5 bl. í senn): 340,-/ársfj.
- ☐ Onnur lond: Ymiskir prísir

Til ber altíð at gerast haldari og goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum

Navn:

Bústaður:

.....

Postnr., bygd/býur:

.....

Tlf.: Undirskrift:

Suðuroyingar missa Smyril - í eina viku

– Tað mugu vit finna okkum í, sigur Páll Vang, býráðsformaður á Tvøroyri

ÁKI BERTHOLDSEN

Suðuroyingar missa nú Smyril.

Men bara róligir. Tað verður bara í nakrar dagar.

Smyril fer í dokk í komandi viku og teir dagarnar, hann ikki siglir, verður tað Dúgvan, sum fer at røkja Suðuroyarsiglingina.

Smyril fer í dokk mánadagin 7. apríl. Seinastu túrurin áðrenn hann fer á beding, verður av Drelnesi henda sama mánamorgunin klokkan 6. 10.

Dúgvan fer so at sigla alla vikuna til fríggjadagin.

Fyrsti túrur hjá Smyrli aftur verður av Havnini suður á Drelnes fríggjakvøldið 11. apríl klokkan 17. 30.

Dúgvan fer at sigla eftir ferðaætlanini hjá Smyrli, tó fer hon hvønn morgun av Drelnesi klokkan 6.10.

Túrðarnir á Vág eru skippaðir og onkrar aðrar, smáar forskjótingar eru eisini ðrar dagar.

Ferðaætlanin hjá Dúgvuni varð lýst í Sosialinum í gjár.

Mugu finna okkum í

Tað er eingin loyna, at suðuroyingar hava verið ógvuliga varnir, hvørja ferð onkur hevur grett orð um at taka Smyril úr sigling og seta Dúgvuna í Rutu ístaðin.

Tað verður heldur ikki heilt ómakaleyst at lata Dúgvuna røkja Suðuroyarsiglingina hesuferð.

Tí ónøgdin hjá Suðuroyingum kom í hæddina einaferð í fjor, tá í Tvøroyrar ein roynd at forða fyri, at Dúgvan varð sett í siglingina burturav.

Hann sigur, at hann fer nú at kalla býráðið saman, kanska longu í dag, at taka býráðssamtyktina aftur um at Dúgvan ikki fær atløguplóss á Tvøroyri.

heilt einfalt samtykti, at Dúgvan skal ikki fáa atløguplóss á Tvøroyri.

Og gamalt er, at ein býráðssamtykt stendur við makt, til ein nýggj er gjørd, sum tekur hana av.

Páll Vang heldur, at suðuroyingar mugu góðtaka, at Smyril fer í dokk í nakrar dagar, og at Dúgvan siglir hesar dagarnar.

Samtyktin hjá býráðnum skuldi heldur skiljast sum



Smyril fer nú í dokk og suðuroyingar mugu klára seg við Dúguni í næstu viku